ítróttur

Nr. 188 • týsdagur • 4. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nýggi maðurin visti av ongum

**Bergur Midjord var sera bilsin, tá hann seint leygarkvøldið fekk boð um, at hann skal við í ferðalagnum, sum týsmorgunin setir kósina móti Ísrael**

NÝGGJUR LANDSLIÐSSPÆLARI

*Jákup Mørk*

Tað var ikki fyrr enn seint leygarkvøldið, at Bergur Midjord fekk boðini um landsliðsúttøkuna. Skrivstovan hjá FSF hevði til fánýtis roynt at fingið fatur á honum, og at enda vórðu boð løgd heima hjá foreldrunum, um at spælarin skuldi seta seg í samband við FSF sum skjótast.

- Hesum hevði eg so slettis ikki rokna við, so tað var avgjørt eitt gott yvirraskilis at fáa, helt fegni spælarin, tá hann hevði fingið boðini.

Við góða spæli sínum gjøgnum alt árið hevur hann annars gjørt fólk flest varug við, at ein komandi landsliðsspælari kanska var í væntu. Og ikki minst man tað hava talt rætta vegin, at hann eisini er ein av spælarunum, sum gjøgnum øll ungdómsárini hevur umboðað Føroyar. Nakað sum eisini ber við sær, at landsliðsvenjararnir fleiri ferðir hava sæð hann í altjóða dysti.

Spurdur, hvørjar orsøkir hann dugdi at síggja til úttøkuna, visti Bergur ikki reiðiliga, hvat hann skuldi svara.

- Tað má væl saktans vera spælið hjá mær í ár. Eg haldi eisini sjálvur, at tað hevur gingið hampuliga væl, men at tað skuldi røkka so langt longu nú, hevði eg ikki droymt um. Og beint nú eri eg bara fegin um at hava fingið slíkt heraklapp, staðfesti hann.



*Bergur Midjord var bæði fegin og bilsin, tá hann seint leygarkvøldið fekk boð um at seta seg í samband við Fótbóltssambandið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Trívist á grasi

Bergur er annars ein av teimum fáu heimligu spælarunum, sum tykist trívast best á grasi. Hetta var eitt nú sjónligt í UEFA-Cup dystunum hjá B36, har hann í trimum førum var millum allar bestu spælararnar hjá B36, og har hann eisini skeyt trý mál í trimum dystum.

Egineikin at hugsa skjótt og flyta seg skjótt - bæði við og uttan bólt - kemur her enn betri til sjóndar, enn hann ger tað á grasinum, og longu í fjør gav hann eisini boð um hetta, tá B36 spældi móti letlendska Metallurgis.

Sjálvur var hann ikki ósamdur í, at hann trívist væl á grasi.

- Tað dámar mær betri enn graslíki. Og tað gekk eisini gott í UEFA-Cup dystunum, har sjálvsálitið eisini fekk eitt skump við málunum, sum eg skeyt.

- Men her og nú ræður um at gloyma hetta eina løtu. Vit hava eina uppgávu móti KÍ í morgin, tað er fyrst og fremst hana, sum eg nú fari at hugsa um, staðfesti nýggi landsliðsmaðurin altso leygarkvøldið.

# Úrtøkan var rættiliga soltin

**Trý av fýra feløgum, sum hava føroyingar á liðnum, fingu einki burturúr, men fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum megnaði felagið hjá Atla Gregersen at lyfta seg av botnplássinum**

DANMARK 1. DEILD

*Jóannes Hansen*

Tað hilnaðist ikki væl hjá flestu føroysku spælarunum í næstbestu donsku deildini sunnudagin. Størsta vónbrotið var tað hjá Frem, sum nú av álvara er farið at kenna tað brenna undir sær.

Hesa ferð var Frem á útivølli í Hellerup móti HIK. Heimaliðið vann 1-0, eftir at Frem mest sum alla tíðina hevði havt yvirvág. Sigursmálið fekk heimaliðið, tá ið tað restaðu fýra minuttir. Jónas Þór Næs og eykamálverjin, Gunnar Nielsen, sótu alla tíðina á Frem beinkinum, og teir sóu Frem málverjan, Jørgen Nielsen, gera sjálvmál, tá ið hann eftir horna boksaði bóltin upp í nettakið. Jón Rói Jacobsen var alla tíðina í miðverjuni hjá Frem.

Tapið var tað sætta hjá Frem í hesum kappingarárinum. Frem er nú fimti aftast, og tað er ein støða, sum teir í Frem ikki eru nøgdir við, hóast teir undan hesum kappingarárinum mistu fleiri spælarar. Fleiri av tapunum hava verið heilt óneyðug, halda teir í Frem.

Skjold, sum hevur Atla Gregersen á liðnum, hevur higartil verið á aftasta plássinum. Sunnudagin vann Skjold 2-1 í Århus á Brabrand. Sigurin bar við sær, at Skjold flutti av aftasta og upp á næstaftasta plássið.

Christian Lamhauge Holst var alla tíðina í álopinum, tá ið Lyngby var í Vejle, har heimaliðið vann 2-0. Ein gamal kenningur í NSÍ, Ulrik Balling, staðfesti sigurin, tá ið seinna umfarið var tveir minuttir gamalt.

Fremad Amager megnaði ikki at halda tørn um oddasessin, men Andrew av Fløtum vísti, tá ið teir vóru í Nykøbing á Falster, at tað framvegis eru nógv mál í honum. NFA vann 2-1, og Andrew av Fløtum pyntaði í síðstu løtu um úrslitið hjá Fremad Amager, sum við tapinum datt niður á fjórða plássið.

# Bergur fekk landsliðsboð

**Jákup á Borg sendi fríggjakvøldið avboð til landsliðsferðina. Í hansara stað varð Bergur Midjord fyri fyrstu ferð tikin út til landsliðshópin**

LANDSLIÐSÚTTØKA

*Jákup Mørk*

Tað hevur oftani verið so, at ein nýggjur spælari er tikin við á seinastu landsliðsferðina á árinum sum eitt slag av heraklappi fyri eitt gott kappingarár.

Soleiðis var tó ikki í fyrsta umfari, tá Henrik Larsen boðaði frá, hvørjar spælarar hann ætlaði at hava við sær til Ísrael. Her taldi hópurin flestu av teimum, sum gjøgnum árini hjá Henrik hava tænt bæði honum og landinum, og sum so var tað kanska heldur ikki so óvæntað, nú venjarin fyri seinastu ferð skal hava ábyrgdina av liðnum.

## Vildi ikki satsa

Men fríggjakvøldið kom so avboð frá Jákupi á Borg.

– Eg fekk eitt lítið trælær í dystinum móti VB, men eg spældi tó dystin lidnan kortini. Síðani hevur tað tó víst seg, at hetta hevur sitið rættiliga djúpt, og fysioterapeuturin hjá okkum hevur sagt, at eg helst skal binda frið eina heila viku afturat. Og tá talan er um somikið langa ferð sum til Ísraels, so haldi eg tað vera eitt sindur býtt at fara við, og so satsa upp á at tað gongur. Tá er tað helst betri, um ein spælari, sum við vissu er klárur, fer í mínum stað, segði Jákup sjálvur við sportalin, og tað gjørdi tað so neyðugt hjá landsliðsvenjarunum at finna nýggjan spælara.

Júst kantspælarar eru ikki teir, sum tað eru flestir av í føroyskum fótbólti, men valið fall á Berg Midjord úr B36, sum ongan tíð áður hevur verið á A-landsliðnum.

Men í veruleikanum var valið kanska ikki heilt so óvæntað kortini. Bergur hevur í ár verið ein sera týðandi partur av oddastríðnum hjá B36, har hann við ferð og góðum arbeiðsavrikum hevur avrikað nógv í spælinum. Bæði í álopinum og á kantinum.

Og skal tosast um dystir á grasi, so hevur 20 ára gamli spælarin longu prógvað, at hetta er nakað, sum hann trívist sera væl við. Í øllum førum mundi hann vera millum bestu spælararnar hjá B36 í góða UEFA-Cup avrikinum, og í teimum trimum dystunum, sum hann spældi í kappingini, eydnaðist honum at skjóta trý mál.

Eisini í fjør var hann málskjútti hjá B36 í altjóða høpi, so illa kann sigast annað, enn at hann trívist væl á grasi.